## Samband

**Heilsu- og umsorganartænastuna**
Postboks 32 • FO-110 Tórshavn
tel. 302010 • heilsuhusid@torshavn.fo

Mánadag - hósdag kl. 8.00-15.30
Fríggjadag kl. 8.00-15.00

Hava tygum átrokandi boð uttan fyri vanligu telefontíðina um kvøldið og í vikuskiftinum ber til at ringja hesi nummur:

**Sjúkrarøktarfrøðingar**
millum kl. 15.30-7.00, telefon 793199

**Starvsfólk (heimahjálp) í vesturbýnum**
millum kl. 15.30-23.00, telefon 793121

**Starvsfólk (heimahjálp) í eysturbýnum**
millum kl. 15.30-23.00, telefon 793161

Teldupostur til móttøkuna: heilsuhusid@torshavn.fo
Heimatænastan veitir ikki bráðfeingistænastu.

Meira fæst at vita um Heilsu– og umsorganartænastuna á www.torshavn.fo



September 2024

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

UMSORGAN OG RØKT

# Heimatænastan

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo

**UPPLATINGARTÍÐIR**

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt





UMSORGAN OG RØKT

# Heimatænastan

**Kjarnuuppgávan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni er við miðvísari umsorgan, tænastu, heimatænastu, heilsu- og sjúkrarøkt at stuðla borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.**

Virkin og vakin – alt lívið merkir fyri okkum í Heimatænastuni, at vit miða ímóti, at gera tað møguligt hjá tær at búgva heima sum longst í best møguligum umstøðum, um tað er heilsuliga og samfelagsliga ráðiligt.

Í Heimatænastuni veita vit heilsu- og sjúkrarøkt til heimabúgvandi borgaran. Hjá okkum starvast sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar, heilsuhjálparar og heimahjálpir, og hava vit tætt samstarv við aðrar fakbólkar.

Starvsfólk hava felags ábyrgd av at veita borgarum eina samanhangandi tænastu við dygdargóðari røkt, viðgerð, heilsufremjan, fyribyrging og rehabilitering.

## Tagnarskylda

Øll starvsfólk, sum verða sett í starv í Heilsu- og umsorganartænastuni, undirskriva eitt tagnarskylduskjal, vísandi til §26 í Fyrisitingarlógini og §§ 152c-152f í Revsilógini.

Tagnarskyldan stendur við, tá tann setti fer úr starvi.

## Samstarv

Vit ynskja eitt gott samstarv við teg og tíni avvarðandi. Tá vit veita tænastu, er tað okkara mál at varðveita sínámillum virðiligt samskifti millum teg, starvsfólk og avvarðandi.

## Títt heim – okkara arbeiðspláss

Arbeiðsumhvørvið er skipað við heimild í løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi, og merkir, at arbeiðið skal skipast soleiðis, at tað trygdarliga og heilsuliga kann gerast væl.

Tað er orsøkin til, at vit kanna heim títt við atliti til, at tænastan verður veitt undir tryggum umstøðum fyri borgara og starvsfólk.

Tí kann tað verða neyðugt at fáa til vega ymisk hjálpartól og gera broytingar í heiminum, áðrenn vit kunnu veita tænastu.

## Heimið

Fyri, at tú kanst fáa heimatænastu, skal heimið vera so mikið reint og ruddiligt, at tað er atkomuligt hjá okkara starvsfólkum at veita tænastu.

Tað er ábyrgdin hjá tær og tínum avvarðandi, at atkomuligt er uttandura. Tað merkir, at nøktandi ljós er uttandura, og at kavin er ruddaður/ at túnið er saltað um veturin, tá tørvur er á tí.

## Royking

Um tú roykir, seta vit krav um, at ikki verður roykt, meðan tú fært tænastu frá okkum, og luftast skal út áðrenn vitjan.

## Húsdjór

Húsdjór skulu vera í bandi, í búri, ella øðrum rúmi, meðan starvsfólk eru inni.

## Rúsevni

Eitt aktivt misbrúk, kann ávirka samstarvið og samskifti negativt millum teg og starvsfólkini og hetta inniber, at starvsfólk ikki fáa veitt tær tænastu.

## Lógargrundarlag

- Tænastan tekur støði í løgtingslóg um heimatænastu
- Arbeiðsumhvørvislógin www.arb.fo

**Lógarheimild í mun til kunnað samtykkið**
https://logir.fo/Logtingslog/73-fra-08-05-2001-um-vidgerd-av-personsupplysingum-sum-broytt-vid-logtingslog-nr-24-fra

**Lógarheimild um gjald**
https://logir.fo/Kungerd/126-fra-17-12-2014-um-heimataenastu-og-gjald-fyri-heimataenastu-eldrarokt-oa